# Ph.D. verkætlan á Náttúruvísindadeildini

Á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya er eitt 3 ára Ph.D.-lestrarstarv tøkt frá 1. mars 2002. Tað verður væntað, at tann, ið settur verður, kann verja arbeiði sítt fyri Ph.D.-gradina innan fyri tíðarrammuna uppá 3 ár.

Ph.D. verkætlanin verður skipað við atliti at føroysku jarðfrøðini og møguleikunum fyri at finna kolvetni í henni. Verkætlanin kann t.d. taka støði í einum av hesum evnisøkjunum (dømir):

- Model fyri hvussu alisfrøðiligir parametrar fordeila seg í basalti kring Føroyar, og hvønn týdning teir hava fyri jarðalisfrøðiligar metodur, ið verða brúktar til kortleggingar av løgum undir basaltinum.
- Geodynamisk model fyri »syn-rift« og »post-rift« útviklingi av Føroya-plattforminum og økjunum nærindis.
- Kanning av hvønn týdning »offset« hava fyri seismiska avmynding av legugrýti undir føroyska basaltinum. Hetta kann gerast teoretiskt, við digitalum modellum og við praktiskum dømum (»case studies«).

Umsøkjarar til Ph.D.-lestrarstarvið skulu hava prógv sum cand. scient. ella sivilverkfrøðingur (t.d. prógv í jarðalisfrøði, jarðfrøði ella kolvetnisverkfrøði). Tó eru tey, ið eru ávegis at gera kandidatuppgávu, eisini vælkomin at søkja.

Tann, ið settur verður, kemur sum partur av Ph.D.-lestrarstarvinum at taka ymisk skeið og luttaka á ráðstevnum og verkstovum. Dentur verður lagdur á at hava gott samband við altjóða viðurkend granskingarumhvørvi, og tí má tann, ið settur verður, rokna við styttri ella longri tíðarskeiðum á læru- ella granskingarstovnum uttanlands.

Lønin er sambært stig 1 við førleikaløn stig 13 í sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya. Fyrivarni verður tikið fyri niðurstøðu frá Ph.D. arbeiðsbólki, sum skal verða tøk 1. februar. Setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Umsóknarfreistin er mánadagin 21. januar 2002. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum og møguligum greinum skulu sendast í 4 eintøkum til

**Fróðskaparsetur Føroya,**
J. C. Svabos gøta 14,
Postrúm 272,
FO 110 Tórshavn.

Meira fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Morten Sparre Andersen, professara, á teldupostadressuni mortensa@setur.fo ella tlf. 315306.

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetri Føroya eru íalt 8 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Harumframt eru tvey starvstovufólk á starvsstovuni og eitt skrivstovufólk í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Ph.D.-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir, mekaniskar eginleikar hjá basalti og simulering av oljureservoirum. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarunum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru um 40 lesandi á NVD.


SKIPASMIÐJAN



ABS Kavpumpur
-lágan rakstrarkostnað
-stórt úrval

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25

P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25

24 tíma Vakt
tlf: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo








Sp/f VVS-HORNIÐ
Lágpríshandil

Alt innan hitaverk & sanitet so sum:
- Stoypijarnsketil
- Sanitet
- Kranar
- Baðirúmsmøblar

Støkk inn á gólvið ella ring

Landavegur 2 - 100 Tórshavn
Tel. 318023 - Fax 310963

Sosialurin - 311820



Alt
- til skrivstovuna

· Brævordnarar
· Kopipappír
· Skiljibløð
· Pennar o.a.

Tað, sum vit ikki hava á goymslu, fáa vit til vega skjótt

Sp/f J.D.Hammer
800 Tvøroyri
Tlf. 372198 · Fax 371198


## HÚSAVØRÐUR!

Søkt verður eftir húsavørði til Kirkjubøar kommunu 15 tímar um vikuna, til skúlan og barnagarðin.
Arbeiðið er í dagtímunum. Møguleiki er eisini fyri, at fáa aðrar uppgávur, eftir nærri avtalu við kommununa.

Viðkomandi skal hava handverkaraútbúgving ella líknandi, og verður løntur eftir sáttmálanum millum Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag.

Umsóknir við prógvum v.m. skulu sendast til Kirkjubøar kommunu FO -176 Velbastaður att: Annfinn Brekkstein og merkjast "Húsavørður"

Seinasta freist at lata umsóknir inn er
**10. januar 2002**

KIRKJUBØAR KOMMUNA

team 85 • 316511



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## BÝARARKITEKTUR

Tórshavnar kommuna søkir eftir býararkitekti at byrja skjótast til ber.

Býararkitekturin er, við tilvísing til tekniska stjóran, leiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini, sum m.a. fevnir um planlegging, lendisumsiting, byggimál og húsaumsiting.

**Høvuðsuppgávur**
Deildarleiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini
Planlegging, projekt og ymiskar ætlanir.
Veita serkøna hjálp innan- og uttanhýsis.
Fíggjararætlanararbeiði.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava arkitektaútbúgving frá góðkendum arkitektaskúla og hava drúgvar royndir innan arkitektafakið.

Neyðugt er at duga væl føroyskt í skrift og talu og hava førleika til Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt tekniprogram Cad og/ella MicroStation.

**Persónligir eginleikar**
Kommunan roknar við, at umsøkjarin:
- hevur hugflog og skapandi gávur við atliti til at menna býin,
- dugir væl at leggja arbeiði til rættis og at fyrisita og samskifta, bæði innan- og uttanhýsis, umframt at verða fyrikomandi og kunna arbeiða sjálvstøðugt,
- gongur á odda, er sjónligur, opin og motiverandi,
- hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og til reiðar at taka avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Arkitektafelagið og Fíggjamálastýrið við eini viðbót sum yvirarkitektur á 17. stigi.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. januar .2002. Viðmerk á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

SNARSKIVAN


Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



Café Natúr

Aftaná at vit nú hava umvælt Café Natúr, hava vit roynt at betra um umstøðurnar á loftinum, soleiðis at tit til eina og hvørja tíð kunnu hugna tykkum har, dag sum kvøld. Har er nú betri pláss, ljósari og hugnaligari.
Vit vilja ynskja kundum okkara hjartaliga vælkomin á loftið.
Vit vilja eisini biða kundum okkara um gott tol, vit vita at tað alt ov ofta, er ov nógvur roykur og ring luft á Cafe'ini og fara nú at fáa okkum størri og betri ventilatiónsskipan

livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

Sosialurin 311820


## Kokkur søkist

Søkt verður eftir einum a la carte kokki.

**Bill. mrk. 248**

## Íbúð til leigu

í miðbýnum í Havn.

**Tlf. 212118**

## Skeið í 1. hjálp

Fyrstahjálparskeið 12 tímar og/ella 16 tímar byrja 11. og 12. januar, um nóg nógv tekna seg. Hevur tú annað ynski, so sig frá.

Tú kanst tekna teg við at ringja tlf. 319630 ella við telduposti til: redcross@redcross.fo ella við at senda henda lepa inn áðrenn mikudagin 09.01.02 kl. 21.00.

Skeiðini verða hildin um vikuskifti í Havn, uttan so, at nóg nógv tekna seg aðrastaðni, so kann skipast hold uttan fyri Havnina.

Navn ______________________

Bústaður ______________________

Tlf. ______________________

Ynski ______________________

STARV sosialurin

## Sosialinum tørvar blaðfólk

Hevur tú hug at royna teg á einum arbeiðsplássi, har tað er ferð á allan dagin, har ein deadline er partur av hvørjum einasta arbeiðsdegi, og har tú allatíðina fært nýggjar og spennandi uppgávur, so er hetta kanska møguleikin hjá tær.

Okkum tørvar blaðfólk, og vit bjóða eitt hendingaríkt og fjølbroytt starv, har tú verður partur av eini vælvirkandi redaktión og sleppur at royna teg við alskyns uppgávum.

Seinastu tíðina hava vit økt um virksemi við at skriva tíðindi til www.portal.fo. Hetta hevur eisini ført til økt krøv til redaktiónina, men er eisini við til at menna tíðindaflutningin, sum støðugt verður dagførdur á internetinum.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving ella journalistiskum royndum hava fyrimun. Tað er ein treyt, at tú dugir at orða teg lætt og neyvt á føroyskum, og at tú fylgir væl við í tí, sum hendir og rørist í samfelagnum.

Sosialurin er eitt blað, har tað hendir nakað. Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna, umframt støðugu tíðindi á internetinum.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast okkum innan mánadagin 8. januar 2002. Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Viðmerkjast skal »umsókn«

Hevur tú hug at frætta meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóra, á telefon 211820 ella Eirik Lindenskov, blaðstjóra, á telefon 216409

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. (GG: Hetta er sama starv, sum varð lýst leyst síðstu viku í november. Eftir áheitan er freistin longd)

sosialurin sosialurin

## Starvsfólk

Søkt verður eftir starvsfólki til dagrøktarskipanina at byrja 1. februar 2002.

Um eingin námsfrøðingur søkir, skilar kommunan sær rætt til at seta annað fólk í starvið.

Arbeiðsøkið hjá viðkomandi verður í og út frá spælistovuni, og hartil at vera til hjálpar hjá dagrøktarmammunum og leiðaranum.

Skrivlig umsókn skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 21. januar 2002.

**Vestmanna kommuna**